Góðir menn og gott prát.Frá vinstru Christian Olsen, Jógvan við Keldu, Símun á Høvdanum, Eyðfinn Reyðberg, Jan Müller og Karl Johansen

Laða brúgv millum Norðoyggjar og restina av landinum

BLØÐ OG LOKALREDAKTIÓN

y un akst in

Á samkomuni fríggjadagin nýtti blaðstjórin á Sosialinum, Jan Müller, høvi til at takka øllum teimum mongu, sum vóru komin til móttøkuna. Hann segði seg vóna, at hetta nýggja tiltakið fór at gagna báðum pørtum, norðingum og blaðnum. – Skal hetta eydnast, so er neyðugt, at ikki bert blaðið vísir tykkum her norðuri ans, men at tit eisini sjálvi brúka blaðið og teir møguleikar, sum nýggja redaktiónin gevur tykkum segði Jan Müller, sum beyð norðingum at støkka inn á gólvið í Nólsoyar Pálsgøtu, tá teir høvdu okkurt uppá hjartað. – Vit hava sett okkum fyri at lýsa gerandisdagin hjá tykkum her norðuri, soleiðis at tit kunnu kenna tykkum aftur í blaðnum og soleiðis, at tað tit fyritaka tykkum eisini kann vera íblástur hjá fólki í øðrum plássum av landinum. Tað er einki nýtt í tí, at blaðið hevur tilfar úr Norðoyggjum, vit hava jú havt góð fólk her, men tað nýggja er, at vit nú í størri mun enn higartil við at hava egna skrivstovu kunnu hava tíðindi og annað tilfar úr Norðoyggjum segði blaðstjórin, sum vónaði, at hetta nýggja tiltakið kundi vera við at byggja brýr millum Norðoyggjar og miðsteðarøkið og annars aðrar partar av landinum.

Blaðstjórin heitti á allar íbúgvar uttan mun til flokk ella átrúnað o.a. um at taka væl ímóti »Havnabløðunum« og vísti hann á, at eisini hitt stóra blaðið Dimmalætting, fór at hava fólk at arbeiða burturav úr Klaksvík. Hann helt, at hetta átti ikki at nervað tilverugrundarlagið hjá lokala Norðlýsinum nakað nevnivert, tí tað blaðið dekkaði ein annan tørv. Stóru bløðini koma út fimm ferðir um vikuna, so her er talan um at hava aktuell tíðindi og tilfar úr økinum alla vikuna. Hann helt tað annars vera gott við kapping.

– Nú tosað verður um økismenning og menning av smáplássunum kann okkara tiltak vónandi verða við til at birta uppundir eitt livandi orðaskifti í so máta og vera við til at fáa fólk uttan fyri miðsteðarøki at støðast. Vit fara so at viðgera mest sum alt, sum hendir í hesum partinum av landinum, tað veri seg innan vinnulívið, mentanina, familjulívið, ítróttin og kommunalpolitikkin. Nú er so eftir at vísa í verki, at vit meina hetta í álvara, og tað vilja vit so royna at liva upp til segði blaðstjórin.

Nýggja skrivstovan hjá Sosialinum í Klaksvík er útgjørd við nútímans tøkni, sum ger tað gjørligt at arbeiða skjótt við myndum og greinum

Blaðstjórin á Sosialinum, Eirikur Lindenskov, fekk æruna av at hanga skeltið hjá Sosialin upp áðrenn móttøkuna

Sosialurin latið upp í Norðoyggjum

Nógv fólk hugdu fram við, tá Sosialurin hevði móttøku í sambandi við nýggju redaktiónina í Klaksvík

MÓTTØKA

y un akst in

Eini hundrað fólk vóru inni á gólvinum, tá Sosialurin hevði almenna móttøku í Klaksvík fríggjadagin.

Høvið var nýggja Norðoya redaktiónin, sum blaðið hevur latið upp í Klaksvík. Sosialurin fer at halda til í ovaru hædd í Nólsoyar Pálsgøtu 1.

Millum gestirnar á móttøkuni vóru umboð fyri fyritøkur og stovnar, politikarar, lesarar og onnur, sum hava tilknýti til blaðið á ein ella annan hátt.

Røður

Sosialurin bjóðaði pinnamat og okkurt leskandi aftur við, og annars var høvi at eygleiða umstøðurnar á nýggju redaktiónini, sum er útgjørd við nýggjari tøkni, so tað skal bera til at arbeiða skjótt og væl úr Klaksvík.

Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum, bjóðaði fólki vælkomnum, og hann greiddi eisini frá, hvat blaðið vil við nýggju deildini í Klaksvík.

– Hetta er ein væl meint roynd at gera meira burtur úr Norðoyggjum og at hava tættari samband við norðoyingar, og nú er uppgávan hjá okkum at liva upp til tað, sum vit hava sett í gongd, segði hann millum annað.

Eyðun Elttør, landsstýrismaður úr Klaksvík, helt eisini røðu, har hann segði seg fegnast um, at Sosialurin hevði latið deild upp í Klaksvík.

Effe millum Garðarnar, Eyðun Elttør og Jógvan við Keldu

Skrivstovan skal brúkast

Sosialurin ætlar, at nýggja skrivstovan í Klaksvík skal taka sær av tíðindaflutningi úr Norðoyggjum.

Harafturat skulu fólk, sum hava eini hvørji ørindi til Sosialin, kunnu brúka deildina í Klaksvík til hesi ørindi – tað veri seg smálýsingar til Lýsingartorgið, heilsanir ella annað.

Sosialurin hevur í fleiri ár havt fólk arbeiðandi kring landið – bæði í Norðoyggjum, í Eysturoynni, í Vágum og í Suðuroynni. Harafturat hevur blaðið í tvey ár eisini havt eina rullandi redaktión, sum ferðast kring landið.

Við nýggju skrivstovuni í Klaksvík, tekur Sosialurin eitt stig longri í at røkka longri út kring landið.

Olaf Berg, sum hevði reklamu- og prentvirki í Klaksvík í eitt mannaminni, fær sær prát við ábyrgdarblaðstjóran á Sosialinum

Eyðun Elttør, landsstýrismaður, heldur røðu á móttøkuni

Eini hundrað fólk stukku inn á gólvið, tá Sosialurin hevði móttøku í sambandi við nýggju redaktiónina í Klaksvík